# føroyskan hondbólt



*Hesi seinnu árini er tað einamest manslandsliðið, ið hevur verið virkið, men ungdómslandsliðini eru dottin niðurfyri, og tað heldur Kári tekur grundarlagið undan føroyska hondbóltinum*

tilhaldsstaði hjá teimum ymisku landsliðunum, tá ið tey vóru savnað til venjingar, sigur Kári.

### Eiga at brúka útlendsku leikararnar

Tey seinastu okkurt um tíggju árini hava rættuliga fitt av útlendskum leikarum roynt seg í føroyskum hondbólti, og fleiri av teimum hava steðgað í fleiri ár, og onkur hevur valt at búseta seg fast í Føroyum. Hesir leikarar, ið hava royndir úr øðrum og sterkari kappingum, eru ein fongur fyri føroyskan hondbólt, sigur Kári Mortensen.

Hann heldur tað verða upplagt, at Hondbólts-sambandið í nógv størri mun fer at gera nyttu av útlendsku leikarunum og nýta teir í ymiskum venjaraleiklutum.

– Útlendsku spælararnir í Føroyum eru ein risa kapacitetur, ið kunnu geva og hava givið føroyskum hondbólti ómetaliga nógv, heldur Kári Mortensen.

– Eitt annað, ið kann styrkja um føroyskan hondbólt, er, um vit aftur fáa gongd á skeiðvirksemi innan hondbóltin. Í nítiárunum var mangan skipað fyri ymiskum venjaraskeiðum fyri føroyskum hondbóltsvenjarum, og her vóru nógvir útlendskir venjarar á vitjan og góvu eina rúgvu av inspiratión, sigur Kári.

Hann heldur, at vit kunnu læra nógv av Dómarafelagnum, sum veruliga hevur syrgt fyri, at dómarastøðið í føroyskum hondbólti er ment seinnu árini. Felagið hevur javnan skeið fyri dómarunum, og nógv verður gjørt burtur úr eftirmetingum og øðrum, sum kann styrkja førleikan hjá dómarunum.

### Styrkja heimligu kappingina

Eitt av stigunum, ið neyðug eru at taka fyri at menna hondbóltin her heima, er sambært Kára Mortensen, at vit fáa styrkt heimligu kappingina.

– Vit noyðast at hava eina drúgvari kapping, og allarmest hjá teimum 16-18 ára er neyðugt, at tað eru fleiri dystir á skránni. Um tú til dømis hyggur at kappingini hjá kvinnuunglingunum, so vóru tað bert eini 3-4 lið í kappingini farna kappingarár, og tá gerast dystirnir ov fáir. Man kann til dømis skipa fyri ymsum smáum steypakappingum, sum man gjørdi fyrr. Umberingin við at tað so rennur saman við fótbóltinum, heldur ikki í longur, tí ætlar tú tær at verða við í fremstu røð, so noyðist tú at gera av við teg sjálvan, hvørja av ítróttargreinunum, ið tú ætlar tær at satsa uppá, heldur Kári Mortensen.

– Føroyskur landsliðshondbóltur má tora at vera við á jøvnum føti við øll onnur lond.

Børn, ung og vaksin íðkandi mugu vita, hvørjar avbjóðingar standa teimum í boði. Fjølmiðlar, sponsorar og áskoðarar mugu vita, (hetta er so mín meining) at januar er landsliðsmánaðurin hjá teimum vaksnu, har tað hvørt ár verða leiktir fleiri kvinnu- og manslandsdystir her í landinum og úti. At apríl/mai er tíðarskeiðið, har ungdómslandsliðini kappast á jøvnum føti við øll hini, og at summi ár vera kappingarnar í Føroyum, sigur Kári Mortensen at enda.



*Føroyska kvinnulandsliðið stóð seg sera væl, tá ið tað í fjør tók lut í altjóða kapping í Italia, men Kári Mortensen ivast í, hvussu rætt tað er at taka lut í slíkum kappingum*

# Todi á veg úr FCK



*Todi Jónsson fer at leita sær eftir nýggjum felagið, nú tað stendur greitt, at hann ikki heldur fram í FCK*

**FCK tykist ikki sinnað at gera nýggjan sáttmála við føroyska álopsspælaran, sum nú hyggur seg um eftir hvørjir aðrir møguleikar eru fyri at spæla á hægsta støði**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

206 dystir og 68 mál. Tað eru tølini, sum liggja eftir Toda Jónsson í FCK. Hann hevur umboðað felagið 206 ferðir síðani hann saman við formanninum, Flemmingi Østergaard, fyri átta árum síðani flutti úr Lyngby og til FCK. Í løtuni bendir einki á, at dystartalið og máltalið fer at gerast størri, enn tað nú er.

– Eg havi fyri stuttum havt fund við leiðsluna í felagnum. Sáttmálaskeiðið hjá mær og FCK verður liðugt 30. juni. Eg fregnaðist eftir, um felagið er sinnað at gera nýggja avtalu um samstarv. Svarið var, at tað høvdu teir ikki tikið støðu til. Tað vil siga, at teir eru ikki áhugaðir í framhaldandi samstarvi, og tí bendir alt á, at eg skal skifta felag í summar, sigur Todi Jónsson.

Todi fylti 2. februar 33 ár. Síðsta árið hevur hann ikki verið nógv at sæð á besta FCK liðnum. Í vár hevur hann ikki spælt í landskappingini. Hesar síðstu vikurnar hevur hann havt lítlan skaða í lærkrikanum at dragast við. Nú er tað nakað síðani, at hann kom fyri seg aftur, men tað hava ikki verið boð eftir honum at spæla á besta liðnum.

Toda hevur restað dystarvenjing. Fyrsta stigið á leiðini at fáa hana tók hann fyrrakvøldið. Tá var hann í 1. hálvleiki á næstbesta FCK liðnum sum á Frederiksberg tapti 5-2 móti Skjold. Í steðginum, tá ið Todi fór av vøllinum, var støðan 2-2, eftir at FCK hevði verið á odda 2-0.

– Eg var nógv skaddur í fjør. Í vetur var eg væl fyri, og eg vandi við fullari ferð saman við hinum. Fyri at spæla á hægsta støði er neyðugt at fáa dystarvenjing. Eg fekk ikki møguleika fyri dystarvenjing tá, og nú eri eg langt burtur frá besta liðnum.

Todi Jónsson heldur tað vera undarligt at flyta frá arbeiðsplássinum og felagnum, sum hann hevur verið partur av seinastu átta árini, og sum hann hevur verið við til so mangar glæsiligar løtur saman við. Men samstundis ásannar hann, at tað er lítil meining í at halda fram í felagnum, um hann skal vera tann fimti í røðini av álopsspælarunum og harvið ikki fáa serligar møguleikar á vøllinum.

– Nú fari eg at leita eftir nýggjum arbeiðsplássi. Eg rokni við, at tað fer at bera mær til at spæla á hægsta støði í eini tvey ár afturat. Eg vóni, at tað fer at bera til at finna felag á Sjællandi. Vit eru familja við trimum børnum, og tað hevði verið sera ólagaligt at flutt, sigur Todi Jónsson.